**Søkt verður eftir**

fólki til skrivstovu okkara 20 tímar um vikuna.

Arbeiðið fevnir um upprættan av vørum og útfyllan av tollingaráheitanum o.a. vanligt skrivstovuarbeiði.

Skrivlig umsókn verður at senda til:

Thomas Dam búnýti
Niels Finsensgøta 18 · Box 1094 · FO-110 Tórshavn
Tlf. 314930 · Fax 314933

Jólatilboð:
**Danmark**
frá 1.955,-

**Keypmannahavn frá kr. 1.955,- t/r**
**Billund frá kr. 1.993,- t/r**
**Spyr eisini um prísir til Odense, Århus og Aalborg.**

Ferðatíðarskeiðið er frá 10. desember 2002 til 5. januar 2003.
Ferðaseðlar skulu keypast í seinasta lagi 7 dagar áðrenn fráferð.

Serligar treytir eru galdandi fyri hesar ferðaseðlar og avmarkað pláss er á hvørjum túri. Nógvur barnaavsláttur verður givin.

Vend tær til tína ferðaskrivstovu
ella Maersk Air tlf. +245 70 10 74 74

MAERSK AIR
It's got to be perfect

pétur og pétur 320 870

**BYNINGSTÆNASTAN**
v gvan oensen

**BYGGI- & PROJEKTERINGS- ARBEIÐI**

Bakkagøta 9, 160 Argir
grogv@post.olivant.fo
Tlf. 322771 - Fart. 222771

Internet Sosialurin
www.sosialurin.fo




# Hey, suðringar!

**Reyni Service og TOYOTA koma at vitja tykkum - og í viðførinum hava vit nakrar av heimsins best umtóktu bilum. Vit síggjast á Hotel Øravík!**





**Bilkrás í Suðuroy!**

- Toyota Yaris 1,3
- Toyota Corolla 1,6 hatchback
- Toyota Corolla 2,0 sedan diesel
- Toyota Corolla 2,0 stationcar diesel
- Toyota Corolla Verso 2,0 diesel
- Toyota Avensis 1,8 Terra
- Toyota Hilux 2,5 SR5
- Toyota Landcruiser 3,0

Vit hava opið:
Frí. 1. nov. kl. 10.00 til 17.30
og ley. 2. nov. kl. 10.00 til 15.30
Framsýningin verður við Hotel Øravík



**Reyni Service**
- fá meira at vita á www.reyniservice.fo

Vegurin Langi
188 Hoyvík
Tlf- 353040

# Bilar

Nr. 209 • hósdagur • 31. oktober 2002 • 76. árg.

# Mazda 6 – familjubilur í heilt nýggjum stíli



*Kabinan er vorðin meira innbjóðandi og sportlig. Í Touring og Sport útgávunum fæst hann t.d. við leðurinntrekki og sóltaki*

**Mazda bilverksmiðjan er farin ordiliga til verka, nú teir komu við einum avloysara fyri Mazda 626. Tað er ikki einans navnið sum er nýtt. Mazda 6 hevur heilt skift stíl bæði uttan og innan. Bilurin er nú ein tann størsti í miðalklassanum**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*



*Aksel Ljósheim frá Berg Motors sýnir her fram nýggja Mazda 6. Bilurin hevur smart design og sportligar koyrieginleikar*

Mazda 626, ið vit kenna sum ein álítandi og slitsterkan bil, verður nú avloystur av Mazda 6, ið er ein heilt nýggjur bilur. Bilurin hevur elegant design og koyrieginleikar, sum eru fult á hædd við evropeisku kappingarneytarnar. Mazda 6 er 7,5 cm longri og hevur 6,5 longri aksilfrástøðu enn forgangarin, og er nú ein tann størsti bilurin í miðalklassanum. Kabinan er vorðin meira innbjóðandi og sportlig í ljósum litum og alu-look á instrumentborðinum. Sama er galdandi fyri koyrieginleikarnar, har ein nýggjur undirvognur ger at bilurin hevur meira sportligar koyrieginleikar. Bilurin fæst í útgávunum Comfort, Touring og Sport.



*Mazda 6 Hatchback aftan*

## Aluminium motorar

Bensinmotorarnir eru eisini nýggir. Teir eru gjørdir úr aluminium. Ein 1.8 litur við 120 hk, ein 2.0 litur við 141 hk og ein 2.3 litur við 166 hk.

Mazda 6 verður gjørdur sum sedan, hatchback og stationcar. Á trygdarøkinum eru stór framstig, sum til dømis "anti-piskesmæld" setur og airbag framman, í síðunum og gardinairbag. Bilurin hevur eisini nógva innbygda trygd. Mazda 6 hevur nógva útgerð sum standard, sum t.d. aircondition, elsíðurútar framman, elsíðuspegl og rattið kann stillast allar vegir. Eisini fæst hann við fartpiloti, leðurrætti, hita í setrunum og DSC, sum elektroniskt ansar eftir at bilurin ikki glíður út í svingum. Í fyrstu atløgu er Mazda komin sum sedan og hatchback. Mazda 6 hevur longu fingið góð skotsmál. Hann bleiv nummar tvey, tá danskir motorjournalistar valdu "árets bil i Danmark 2003" og nummar eitt í eini test hjá Bil Magasinet, har teir samanlíknaðu bilin við aðrar kappingarneytar. Vit frættu júst nú at hann bleiv ársins bilur í Nýsælandi.

## Mazda 6 1.8 sedan

| | |
|---|---|
| Motorurin | 1.8 litur 4 syl og 120 hk |
| 0-100 km/t | 10,7 sek. |
| Bensinnýtsla | 12,0 km/l (blandað koyring) |
| Dekkstødd | 195/65-15 |
| Stødd og vekt | |
| Longd | 468,0 cm |
| Breidd | 178,0 cm |
| Hædd | 143,5 cm |
| Eginvekt | 1250 kg |
| Totalvekt | 1850 kg |
| Viðførisrúm | 500 litrar |
| Prísur | kr. 198.700,- (1.8 sedan Comfort) |
| Søluumboð | Berg Motors<br>Staravegur<br>FO-100 Tórshavn<br>Telefon 313535 |